# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# – Altíð ein nýtappað øl



*Eftir at teir góvust við framleiðsluni av sodavatni, verður nú bert øl bryggjað á Restorffs Bryggjaríi*
*Mynd: Bárður*

**- Vit ætla at venja fólk við, at vit nú altíð hava nýtappað frískt øl á goymslu. Og júst sum man keypir kjøt frá slaktaranum, keypir man øl á bryggjarínum, verður sagt av Restorffs Bryggjarí**

Nú er nakað síðani, at Føroya Bjór í Klaksvík tók yvir framleiðsluna av Sisu-sodavatninum, sum var eitt av vørumerkjunum hjá Restorrfs Bryggjaríi í Havn.

- Vit mettu, at var ein røtt avgert at steðga framleiðsluni av sodavatni, hóast nógv siga, at Restorffs er besta sodavatnið í Føroyum.

- Óhugsandi er ikki at ein ávís framleiðsla verður tikin upp aftur seinni, tí øll framleiðslutólini eru tøk, verður sagt.

Bryggjaríið konsentrerar seg nú um framleiðsluna av øli. Nú sodavatnið ikki tekur pláss, verður skjótt ein nýggj og meiri kundavinarlig sølubúð gjørd.

Annars eru í ár liðin 155 ár síðani Restorffs Bryggjarí byrjaði, og er ætlanin at hátíðarhalda henda dagin við einum størri tiltaki um ein mánað.

### Meiri sjónligt

Síðan bryggjaríið gavst við sodavatninum er sølan av øli munandi vaksin. Felagið hevur í løtuni sølustøð á Sandi, Vági og Tvøroyri og eisini har er sølan nøktandi. Restorffs fer framyvir eisini at gerast meira sjónligt á Tvøroyri.

- Vit ætla at venja fólk við, at vit altíð hava nýtappað, frískt øl á goymslu. Og júst sum man keypir kjøt frá slaktaranum, keypir man øl á bryggjarínum.

- Okkara øl er økologiskt og ongi kemisk evni verða tilsett. Júst sum feskur fiskur, er nýtt øl allarbest. Gullølið selur best, men MUNGÁT og VARGUR eru í støðugum vøkstri. Fleiri og fleiri ung keypa eisini TARVIN, verður sagt.

Ætlanin er somuleiðis at koma við einum Classic øli, eins og ein onnur og størri ølfløska fer at koma á marknaðinum. Henda fer helst at taka dystin upp við fríggjadagsvínfløskuna.

### Nýggja tappilinju

Ætlanin er at nútímansgera bryggjaríð og at keypa eina nýggja tappilinju.

Hetta er ein munandi íløga og verður hugt at íleggjarum at koma uppí felagið. Eisini okkurt útlendskt bryggjarí hevur sýnt áhuga fyri samstarvi.

- Felagið harmast um at ikki er loyvt at lýsa í bløðunum við framleiðslunum og at Vinnimálastýrið onki ger við at loyva at bryggja sterkari enn 5,8 %, verður sagt.

Felagið fer framyvir miðvíst at økja áhugan fyri føroyskum øli. Tí, sum teir halda uppá: Øl notið við máta er gott, og er eisini gott fyri heilsuna.

**sb.**

Randi M. Gunnarsdóttir, listakvinna:

# Málningaframsýning á Hotel Hafnia



TÍÐINDASKRIV

Allan mai mánað, frá 1. til 31. mai, hevur Randi M. Gunnarsdóttir á Norðasta Horni í Havn málningaframsýning á Hotel Hafnia (Lobby).

Á framsýningini, ið er ein søluframsýning, eru seks stórir akrylmálningar við ymiskum myndaevnum.

## Tøkk

Hjartans tøkk til øll tykkum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi í stóru sorg okkara, tá ið elskaði sonur, bróðir, svágur og pápabeiggi okkara

**Pól Jóhannus Poulsen**

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri kransar, blómur og gávur til Vestmanna kirkju.

**Tórgerð, Eilir, Dalli, Wilai og børnini**